Álit

í

løgtingsmáli nr. 60/2022: Uppskot til løgtingslóg um almennu talgildu postskipanina Mínboks

Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 20. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við KT-felagið, Bárð Larsen, lektara á Fróðskaparsetrinum, landsstýrismannin í almanna- og mentamálum og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við lógaruppskotinum er at gera talgildu postskipanina, Mínboks, til ta almennu talgildu postskipanina í Føroyum og at áseta teir løgfrøðiligu karmarnar fyri almennu postskipanina.

Høvuðsáttur í lógini er at javnstilla rættarvirknaðin av talgildum samskifti gjøgnum almennu talgildu postskipanina við rættarvirknaðin av skrivligum samskifti umvegis vanligan pappírspost og teldupost.

Nevndu orsakirnar til uppskotið eru, at verandi Mínboks, sum Talgildu Føroyar keyptu frá Elektron í 2017 fyri 5 mió. kr., einki lógargrundarlag hevur, og at slík postskipan er ætlað at vera partur av høvuðsáttunum í Vanganum. Við fyriliggjandi lógargrundarlagi verður Mínboks almenna talgilda postskipanin í Føroyum.

Nógvir spurningar hava tikið seg upp í sambandi við málið um eina talgilda postskipan, m.a. um kt-trygd, verju av persónsdátum, um ymisk sløg av samskifti hjá sera ymiskum stovnum, um prís, um tøkniliga atkomuligheit, um rættarvirknað og um møguleikan og rættin framhaldandi at taka ímóti posti gjøgnum teldupost og pappírspost. Nevndin hevur undir viðgerðini sett hoyringarpørtunum spurningur um øll hesi mál og heitir á landsstýrið um frameftir at samskifta nærri við MEGD og Almannaverkið í arbeiðinum við at menna og bøta talgildar skipanir í Føroyum, so atlit alla tíðina kann takast til teirra, sum hava avbjóðingar við talgildingini.

Nevndin heldur seg hava fingið vissu fyri, at samskifti við almennar stovnar gjøgnum teldupost og pappírspost kann halda fram fyri øll tey, sum vilja tað. Nevndin heitir eisini á landsstýrið um at taka upp samskifti við kommunurnar um ein felags leist fyri at fíggja og útbyggja talgildar skipanir. Tað er greitt, at enn fleiri persónsdátur við tíðini væntast at verða savnaðar í somu skipanum, Heldini, Vanganum og Mínboks, og at tað tí áhaldandi hevur týdning at eftirmeta og menna KT-trygdina fyri hesar skipanir, og nevndin heitir á Fíggjarmálaráðið at taka tað í hoyringarnotatinum nevnda samskiftið upp við KT-felagið.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. apríl 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Hanna Jensen
Eirikur í Jákupsstovu	Bjarni Hammer	Steffan Klein Poulsen
	Magnus Rasmussen	